## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og regn av og á, í støðum mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn av og á. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul av landnyrðingi og norði, turt og sólglottar. Hitin um 8 stig. Sunnudagin upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur ella heglingur. Hitin fellur niður í eini 4 stig.

# Grindadráp órógvaði kombikkaveiðu

SANDAGERÐ
*Jan Müller*

Langt er millum grindirnar í Sandágerði. Og langt er millum so stórar grindir sum hesa henda leygardagin í oktober. Tað er tí heldur ikki hvønn dag, at børn og ung verða tikin á bóli, tá tey hugna sær í Sandágerði. Hetta máttu tvær havnargentur sanna, tá teir eftir middagsleiðið seinasta leygardag høvdu leitað sær úti í Sandágerð við spann og glúpi. Tær vóru farnar at leita eftir kombikkum millum klettarnar í Sandágerði. Bráddliga varnaðust tær ein øgiligan gang og brest í sjónum. Tað mundi kennast sum okkurt heilt serligt var á vási. Og so varð. Tær báðar kombikkagenturnar vóru rætt og slætt tiknar á bóli, tá 200 hval komu brestandi við sjógv á baki og royndu at gera landgongd á sandinum og aðrir 50 rendu seg fastar millum somu klettar tær høvdu peikað út til at finna nøkur fitt kombikk.

Og tað gekk so bert ein løta til tær báðar vórðu umringaðar, ikki bert av flýggjandi hvalum men eisini av eini forvitnari og skoðandi fjøld av fólki. Alla staðni vóru fólk, við sóknaronglum, langum knívum, við fototólum og við kikarum. Ein skarði av eygleiðarum hevði funnið sær pláss á høvdini omanfyri sandin at skoða reyðdæmda ræðuleikan komandi minuttirnar.

Millum teirra vóru eisini mong børn og ung og har hoyrdust tí eisini barnsligar sálir siga, at hetta var so synd fyri hvalirnar, at teir vórðu fangaðir millum allar hesar bátarnar og menninar, og kundu ikki sleppa til rýmingar.

Soleiðis fór hesin leygardagurin hjá tveimum havnargentunum á kombikkaveiðu í Sandágerði. Kombikkini fingu frið henda dagin. Men tað fingu hvalirnir ikki. Livst so spyrst.



*Havnargenturnar, sum vórðu heilt tiknar á bóli, tá tær leygardagin fangaðu kombikk í Sandagerði*
*Mynd Jan Müller*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷7 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 13 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 26 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 33 |
| New York | 15 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 982 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga móti Íslandi. Eitt annað lágtrýst, 1002 hPa. yvir Ermasundi fer norðureftir.




Lágtrýstið við Ísland fer spakuliga í landsynning og brúgvalagið haðani verður nær Føroyum mikukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/10 kl. 06⁰⁰–12/10. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,5°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 11/10 kl. 06⁰⁰–12/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 66,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

5. okt.: Mánin longst frá jørðini
6. okt.: Seinna kvarter
14. okt.: Tendring
17. okt.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 13. okt | 06.38 | 18.58 | 05.38 | 17.58 | 05.53 | 18.13 | 08.38 | 20.58 | 09.38 | 21.58 | 04.53 | 17.13 | 03.53 | 16.13 | 06.53 | 19.13 | 07.53 | 20.13 | 06.23 | 18.43 | 07.38 | 19.58 |
| 14. okt | 07.18 | 19.39 | 06.18 | 18.39 | 06.33 | 18.54 | 09.18 | 21.39 | 10.18 | 22.39 | 05.33 | 17.54 | 04.33 | 16.54 | 07.33 | 19.54 | 08.33 | 20.54 | 07.03 | 19.24 | 08.18 | 20.39 |
| 15. okt | 08.01 | 20.23 | 07.01 | 19.23 | 07.16 | 19.38 | 10.01 | 22.23 | 11.01 | 23.23 | 06.16 | 18.38 | 05.16 | 17.38 | 08.16 | 20.38 | 09.16 | 21.38 | 07.46 | 20.08 | 09.01 | 21.23 |
| 16. okt | 08.46 | 21.10 | 07.46 | 20.10 | 08.01 | 20.25 | 10.46 | 23.10 | 11.46 | — | 07.01 | 19.25 | 06.01 | 18.25 | 09.01 | 21.25 | 10.01 | 22.25 | 08.31 | 20.55 | 09.46 | 22.10 |

5 707265 100036 >